gult10 cyan10 magenta10 svart10

ítróttur

Nr. 213 • leygardagur • 16. juni 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nógvir lykla-spælarar eru burtur



**Bæði hjá B36 og KÍ, sum eisini skulu spæla á ólavsøku, sita týdningarmiklir spælarar uttanfyri við skaða**

Tað plagar at verða roknað sum ein áhugaverd uppgerð, tá KÍ vitjar B36 í Gundadal, og hóast avrikini vóru heilt ymisk hjá liðunum báðum síðsta sunnudag, so slepst ikki undan, at talan er um klassikara. Men tað fer neyvan at renna so nógv niður í B36 kassan hesa ferð, sum tað ofta áður hevur gjørt, tá klaksvíkingar hava vitjað.

Orsøkin er eyðsýnd. KÍ viðhaldsfólkini vita ikki, hvar tey hava teirra lið. Tá teir fóru til Vágs í triðja umfarinum, vóru KÍ spælararnir illa kroystir. So vunnu teir, KÍ kom í steypafinaluna, har teir ólavsøkudag á Tórsvølli skulu spæla ímóti B36, og tað tóktist sum glið var komin á í landskappingini.

Norðoyarstevnan hevur sjáldan roynst væl hjá KÍ í landskappingini, og sambært Norðlýsinum í gjár, so verður 4–0 tapið ímóti EB/Streymi mett sum vánaligasta úrslitið hjá KÍ í landskappingini nakrantíð.

Fyritreytirnar hjá Tomislav Sivic og hansara monnum at reisa seg í Gundadali eru einki serligar. Liðformaðurin, Allan Joensen, hevur verið roknaður sum týdningarmiklasti spælarin. Eftir tvey ára skaða var hann rættuliga við at koma fyri seg, men so varð hann skaddur í Runavík. Tá tað stóð illa til ímóti EB/Streymi, varð hann settur á vøllin. Tað hevði við sær, at skaðin versnaði, og nú er ivasamt, um Allan verður við aftur undan summarsteðginum.

Tomislav Sivic hevur sjálvur verið sjúkur í vikuni. Erling Fles vandi ikki fyrrapartin av vikuni, og Fríðin Ziskason hevur verið burturstaddur. Alexander Djordjevic hevur verið hálvskaddur, men hann vandi hóskvøldið.

Á norðoyarstevnu var treiski miðverjin, Andrass Jacobsen, fluttur niður í 2. deild. Hann verður við aftur í morgin.

### Magni langtíðarskaddur

B36 fekk trý kærkomin stig á Toftum, men tað var ikki uttan kostna. Magni á Lakjuni noyddist av vøllinum longu í 1. hálvleiki. Liðbondini í fótliðnum hava fingið stóran løst. Magni hevur ikki vant í hesi vikuni, hann verður ikki við í morgin, og tað er sera ivasamt, um hann verður við tær næstu vikurnar.

Pól Thorsteinsson hevur verið á vøllinum, men hann hevur ikki vant saman við hinum, og hann verður ikki við ímóti KÍ. Herbert í Lon Jacobsen hevur trupulleikar við tjúkkanum, og hann verður ikki við næstu vikurnar. Jens Kristian Hansen hevur í hesi vikuni vant saman við hinum. Hann verður í hópinum, men tað er ivasamt, um hann verður ímillum teir fyrstu ellivu.

Tvey mála skjúttin á Toftum, John Petersen, noyddist av vøllinum í 2. hálvleiki. Hann hevur trupulleikar við øðrum knænum. Hóskvøldið royndi hann at venja, men hann noyddist at gevast. Í B36 vóna teir, at hann verður førur fyri at spæla í morgin. Samstundis gleðast teir um, at B68 dysturin vísti, at hópurin er so deiliga breiður, sum teir taka til.

# Sandoyingarnir eru heilt væl nøgdir

**Og meistararnir úr Vági, sum tykjast endurreistir, eru heilt væl fyri, nú teir fara norður til Sandoyar**

Tað eru tvey lið, sum síðsta sunnudag stóðu fyri heilt góðum avrikum, ið hittast á Sandi í morgin. Á Sandi siga teir seg leggja lítið í, at umrøðurnar fyri tað mesta hava snúð seg um, hvussu vánaligt avrikið há HB var. B71 hevði eina ætlan, hvussu teir fyri fyrstu ferð í sjey ár skuldu fáa stig á útivølli ímóti HB, og tað eydnaðist.

Nú fáa teir vitjan av VB, og tað verður torført. B71 hevur bara vunnið eina ferð á heimavølli í ár. Tað var í fyrsta umfarinum ímóti EB/Streymi.

Kári Reynheim hevur sama fólkið tókt, sum var við í Gundadali. Høgni Hansen skal av landinum seinni í summar, og hann er givin. Hans Jørgen Djurhuus hevur trupulleikar við lærkrikanum. Hann var ikki



við ímóti HB, og hann verður ikki við í morgin.

Fyrsta treytin fyri at vinna verður, at B71 heldur tætt í verjuni. Tað rokna teir við verður torført ímóti VB, sum tykist hava funnið sera vandamikla áslopsstílin aftur, men á Sandi seta teir sítt álit á, at Valdemar Nowisci skal halda landsmonnunum hjá sær burtur.

### Mugu vinna

Í Vági er fótbóltslagið betri, enn tað hevur verið í fleiri vikur. Venjarin, Krzysztof Popczynski, hevur ikki mist alla vón um, at teir aftur skulu blanda seg í toppin, men so er neyðugt at fáa trý stig hvørja ferð.

– Vit hava allar spælararnar tøkar, og vit fara norður á Sand fyri at vinna. Tórður Holm hevur vant alla hesa vikuna, og so er hann upp á tal at vera ímillum teir fyrstu ellivu. Birgir Jørgensen venur nógv, og hann hevur prógvað, at hann avgjørt er eitt alternativ í álopinum, so vit hava ein positivan trupulleika.

Men um tit skulu hugsa um at koma upp ímillum tey fremstu, so mugu gøtumenn missa stig onkra ferðina?

– Vit vera sjálvsagt áhugaðir í, hvussu tað fer at ganga hjá NSÍ. Eg haldi, at avrikið hjá teimum ímóti okkum var betri, enn tølini vístu, og teir vita væl, at teir hava nakað at prógva á heimavølli á stevnuni. Eg var sera fegin um taktiska avrikið hjá okkum, staðfestir Popczynski.



# Sámal er sera ivasamur

**Gøtumenn venja í Fuglafirði og í Runavík, og Jens Martin vónar, at hansara menn í stevnudystinum fara at reisa seg eftir eyðmýkingina í Vági**



GÍ hevur í fyrsta triðinginum av kappingini verið heilt fyri seg sjálvt. Luturin hjá øllum hinum, sum vilja vera uppií, har tað gongur fyri seg, er at elta GÍ, og tí er eingin ivi um, at nógv eygu og oyru fara at fylgja við, tá stevnudysturin í Runavík verður á skránni klokkan 17 í morgin.

Hjá GÍ verður landsliðsmaðurin og liðformaðurin, Sámal Joensen, roknaður sum undangongumaður. Kortini er tað sera ivasamt, um miðvallarin verður við í morgin. Hann hevur í vikuni verið plágaður av ryggskaða.

Teppið er tikið av vøllinum í Sarpigerði, og tað vil við øðrum orðum siga, at gøtumenn tær næstu vikurnar ongan heimavøll fara at hava. Teir hava fleiri kvøld í hesi vikuni verið í Fuglafirði. Mikukvøldið vóru teir í Runavík, og tað var á vøllinum, har slagið skal standa í morgin, at Sámal fekk ryggskaðan.

Í Vági og ímóti FS Vágum var pólverjin, sum teir kalla Gidek, á miðvøllinum, har hann stóð seg væl. Áslakur R. Petersen og Poul Henning Jacobsen hava sitið á beinkinum tær seinastu ferðirnar, og um Sámal Joensen ikki verður tøkur, so verður tað ivaleyst annar av hesum, sum fer at fáa møguleikan.

### Skulu reisa seg

NSÍ fekk ein orduligan undir vangan í Vági. Men kortini heldur Jens Martin Knudsen ikki, at teir skulu heilt avskrivast ímóti gomlu liðfeløgunum hjá honum í GÍ:

– Tað var ein undarligur dystur í Vági. Vit høvdu bóltin kanska meiri enn teir, men teir vunnu 5–0. Trý tey fyrstu málini vóru sannar perlur, sum teir fingu úr so at siga ongum málmøguleikum. So var alt avgjørt, vit royndu at hótta teir, men teir kontraðu. Fyrr í ár hava vit sent GÍ úr steypakappingini. Stevnudysturin verður ivaleyst sera harður – talan er jú um grannadyst – men vit hava altso møguleikan at reisa okkum, heldur landsliðsmálverjin.

Hjá NSÍ er umleið sama fólkið tókt, sum var við í Vági. Tað er stórur saknur í fleiri av føstu monnunum. Djóni N. Joensen plágast av vøddaskaða, og skotin Martin Glansey og Kári Hansen stríðast við skaðar í liðbondunum.

Spurningurin er so, um tað vera Óli Hansen og toppskjúttin í 1. deild, Helgi L. Petersen, sum fara at basa sínum fyrrverandi liðfeløgum, ella um tað verður Jens Martin Knudsen, sum fer at basa sínum fyrrverandi liðfeløgum.

# Belgiskir fremmandamenn vitja á Svangaskarði í dag

**Intertoto: Lokeren kemur til Føroya í morgun, og teir fara av aftur landinum fyrrapartin í morgin**

Longu í dag er fyrsta altjóða uppgávan í ár hjá føroysku feløgunum á skránni. Tað er B68, sum klokkan 17 í dag fer at spæla í Intertoto á grasvøllinum á Svangaskarði.

Mótstøðuliðið er Lokeren úr Belgia, sum var á fjórða plássinum, eftir at síðsta umfarið í belgisku landskappingini var spælt undan mánaðarskiftinum.

Belgiska liðið kemur í Vágar við leiguflogfari fyrrapartin í dag. Teir fara beinleiðis á Svangaskarð, har teir skulu eta og hvíla seg, áðrenn dysturin klokkan 17 verður bríkslaður at byrja av dómaranum, sum kemur úr Ukreina. UEFA umboðsmaðurin er úr Ungarn. Linjudómararnir eru úr Ukreina, meðan Jens Albert Simonsen hevur uppgávuna hjá fjórða dómaranum.

Tá fótbóltshugaðir føroyingar, ið eru farnir um besta ungdómin, hoyra Lokeren nevnt, so munnu teir ivaleyst hugsa um felagið hjá fyrrverandi danska landsliðsmanninum Preben El-



kjær. Fyri tjúgu árum síðani var Lokeren onkuntíð í toppinum í Belgia, men tey seinnu árini hava teir ikki verið so eyðsýndir.

Tað er einki at ivast í, at mótstøðan hjá B68 verður ivaleysa stór í dag, men tað ber illa til at siga nakað um, hvussu Lokeren verður fyri. Eitt er, at teir hava ferðast langan tein, áðrenn teir skulu spæla. Eitt annað er, at tað ofta hevur víst seg, at í fyrstu umførunum í Intertoto Cup eru flestu feløgini ikki fullmannað. Eftir eitt langt og strevið kappingarár er neyðugt hjá spælarunum at hvíla seg, áðrenn tað verður farið undir eitt nýtt kappingarár, og tí eru tað ofta fleiri av teimum næstbestu, sum fáa møguleikan.

Tað er kortini als ikki víst, at hetta verður nakar fyrimunur fyri B68, tí teir næstbestu eru ivaleyst sera uppsettir at vísa, at teir hava betri uppiborið.

B68 spælararnir gjørdu ikki serliga góða reklamu fyri sær sjálvum, tá B36 var á Svangaskarði sunnudagin. Tá kendust teir tamir og lítið uppsettir. Mikukvøldið vóru teir í Vágum, har teir gjørdu framskundaða landskappingardystin ímóti FS Vágum burturav sær, og tá var hugburðurin heilt øðrvísi, sjálvt um tað skal takast við, at mótstøðan ikki var tann sama, sum hon var ímóti B36.

Stuðulsspælararnir Øssur Hansen, Jan C. Dam og Jan Petersen hvíldu seg síðstu løtuna. Tað vera ikki minst hesir, sum saman við Fróða Benjaminsen skulu ganga undan í dag.

Returdysturin verður í Lokeren í Belgia komandi leygardag. B68 ferðalagið fer úr Føroyum mikudagin, og teir koma aftur til Føroya sunnudagin. Útidysturin í 8. leikumfarinum ímóti GÍ er útsettur til mikukvøldið í aðru viku.

# HB í dalinum og EB/Streymur á veg upp

**Sjálvsálitið í Sundalagnum er í toppi, meðan teir í HB vóna, at teir kunnu venda gongdini eftir sera soltna úrtøku í fýra umførum**

Tá tvey umfør av landskappingini vóru farin, hevði HB fult stigatal. Í teimum fýra umførunum, sum hava verið síðani, hevur tað ikki eydnast havnarliðnum at vinna, og tað mundi kennast sum eyðmýking bara at fáa málleysan javnleik ímóti B71.

– Vit vóna, at liðið síðsta sunnudag var so langt niðri, sum tað ber til, og at vit nú eru á veg uppaftur.

Hetta sigur liðformaðurin hjá HB, Rúni Nolsøe. Hann vónar, at teir fara at vinna á Eiði, men hann heldur eisini, at avrikið hjá EB/Streymi á norðoyarstevnu boðar frá, at talan undir ongum umstøðum verður um lættan sigur.

Allan Mørkøre var leikbannaður seinast, men hann er tøkur aftur. Jón Rói Jacobsen hevur verið sjúkur í vikuni, men hann vandi aftur hóskvøldið. Jóhannis Joensen man vera mest óhepni HB maðurin í ár. Hann hevur leingi verið skaddur. Síðani mánakvøldið hevur hann vant saman við hinum, og teir ætlaðu, at hann skuldi við til Eiðis. Men hóskvøldið endaði hann á skaðastovuni. Teir roknaðu við, at nøsin var brotin, og so verður hann neyvan við á Eiði.

### Sjálvsálitið í toppi

EB/Streymur framdi eitt framúr avrik í Klaksvík. Ikki minst hjá Gunnari á Steig og Andrzeh Pacek mundi tað smakka væl. Teir hava tað til felags, at teir spæla við EB/Streymi, tí teir hava ikki verið mettir at vera nóg góðir til besta KÍ liðið.

Vit skilja á lagnum, at allir spælararnir hjá EB/-Streymi, sum vóru við í Klaksvík, eru tøkir hesa ferð. Bergur Magnussen fer at prædika fyri sínum spælarum, at teir mugu halda seg á jørðini og fara undir uppgávuna á sama eyðmjúka hátt, sum teir gjørdu í Klaksvík. Um teir gera tað, so hava teir møguleika at fáa nakað burturúr, tá HB kemur at vitja. So mikið sást á norðoyarstevnu!

